# Lindin sleppur bíligari

**Útvarpsrásin Lindin hevur gjørt semju við fyritøkuna Grames fyri nýtslu av tónleiki. Preben Hansen, formðaur í nevndini, at innkrevjingin flytur til Føroya, tí so fáa føroysk listafólk meira burturúr**

TÓNLEIKUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




Ára langa stríðið millum fyritøkuna Gramex og útvarpsstøðina Lindina er nú. Stríð endaði við semju, og hetta hevur við sær, at Lindin skal gjalda væl minni fyri at spæla tónleik.

Fyri trimum árum síðan gavst Lindin at gjalda til Gramex, men setti í staðin peningin á bók. Hetta varð gjørt, tí Lindin helt seg gjalda ov nógv til Gramex við tað, at ein stórur partur av tónleikinum, sum Lindin sendir, er avgjaldsfríur. Hetta er galandi fyri nógvan gospeltónleik.

Gramex er ein fyritøka, sum vegna tónleikarar, tónaskøld og sangarar krevur inn pening fyri almenna nýtslu av tónleiki.

Fyri einum ári síðan reisti Gramex endurgjaldskrav móti Lindini, og tað kom so langt, at málið skuldi viðgerast í rættinum fríggjadagin.

## Góð avtala

Men beint áðrenn eydnaðist at fáa semju, sum Preben Hansen er væl nøgdur við. Í eini semju mugu báðir partar slaka, men semjan er til at liva við, sigur Preben Hansen.

Frammanundan hevur Lindin líknandi góða avtalu við Koda.

Preben Hansen leggur ikki í at upplýsa, hvussu nógv Lindin nú skal gjalda fyri tónleikin.

Skuldin er øll goldin.

1. januar verður musikkavgjald yvirtikið, og Preben Hansen vónar, at landstýrið eisini fer at yvirtaka innkrevjingina av gjøldum fyri tónleik.

Hann heldur tað vera skeivt, at ein donsk fyritøka situr við innkrevjingini, tí alt ov lítið av peninginum kemur aftur til Føroya.

Preben Hansen mælir til at hyggja at, hvussu íslendingar gera. Har verða avgjøldini fyri íslendskan tónleik, sum sendur verður í útvarpi og sjónvarpi, kravdur inn í Íslandi, og meginparturin av peninginum fer beint til tónlistafólkini.

www.blakross.fo

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

MÓTTØKA

**Í ár eru 25 ár síðan viðgerðarstovnurin Blákrossheimið fór undir sítt virksemi.**

Í hesum sambandi verður skipað fyri almennari móttøku á Blákrossheiminum, Lynggøta 12, Tórshavn, **hósdagin 17. september kl. 15.00 til 17.00**

Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið.



Um onkur ynskir at geva Blákrossheiminum eina gávu sum heilsan, ynskja vit heldur at peningur verður fluttur á konto til bygging av nýggjum Blákrossheimið, konto nummar 161.553.1 í EIK ella konto nummar 178.328.0 í Føroya Banka

BYGMA
BALSLEV

BYGMA BALSLEV SØKIR...

**leiðara til Byggibúðina.**

Byggibúðin hjá Bygma Balslev, ið er tann elsta í landinum, er nýliga ístandsett og dagførd, so tað er ein nýmótans handil, ið tú kemur at verða leiðari fyri.

Tú fært ábyrgdina av dagliga rakstrinum av Byggibúðini, og ein munandi partur av arbeiðinum verður at motivera starvsfólki, og geva íblástur soleiðis at Bygma Balslev heldur fast um leiðandi leiklutin á marknaðinum. Harumframt fært tú eisini ábyrgdina fyri marknaðarføringini av Bygma Balslev.

Tú mást vænta ymsar arbeiðstíðir og nakrar langar dagar av og á, og vit vænta at tú, við ágrýtni og góðum keypmansskapi, tryggjar framhaldandi framgongd.

Best er um tú hevur hóskandi leiðsluroyndir/útbúgving, og er stinn/ur í teldunýtslu.

Bygma Balslev kann bjóða tær eitt gott, trygt starv, við góðum arbeiðsfeløgum, og góðum umstøðum annars. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Ljóðar hetta áhugavert, so er at senda umsókn sum skjótast, og viðhefta avrit av møguligum prógvum og viðmælum.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinastalagi 28. september.

Nærri upplýsingar fáast við at tosa við Bent á Lava - bent@balslev.fo



Bygma Balslev • Vegurin Langi • 188 Hoyvík • tlf. 345000 • www.balslev.fo